# Skúlasamstarv undirskrivað

**Miðvág og Sandavágs kommunur skrivaðu fríggjadagin undir avtalu, sum staðfestir 44 ára gamla skúlasamstarvið millum kommunurnar**

SKÚLASAMSTARV
*Edvard Joensen*

**Miðvági:**
Formliga avtalan um skúlasamstarv millum Miðvágs og Sandavágs kommunur varð undirskrivað fríggjadagin, hóast komunurnar í 44 ár hava havt felags skúla á Giljanesi. Skúlin á Giljanesi varð vígdur í 1961.

Fríggjadagin hittist felags Hallar- og skúlanevndin hjá teimum báðum kommununum, sum mynda skúalsamstarvið í Vágum, til at skriva undir avtaluna, sum formliga staðfestir skjótt hálva øld gamla samstarvið.

Fimm limir eru í nevndini, og borgarstjórarnir í báðum kommununum eru fastir limir. Tað merkir tó ikki, at annar teirra er formaður. Formaður í fyrstu nevndini er Georg Hansen, bygdarráðslimur í Miðvági.

Nýggja skúlaavtalan staðfestir, at navnið á skúlanum er Miðvágs- Sandavágs Skúli, sum skúlin altíð alment hevur verið nevndur.

Býtið av ymsu skyldunum verður gjørt eftir barnatalinum, har Miðvágs í løtuni hevur meiriluta.

Av teimum fimm nevndarlimunum hevur Miðvágs Kommuna í løtuni teir tríggjar, og hinir báðir eru so úr Sandavági.

Fíggjarliga býtið er soleiðis, at Miðvágs Kommuna í løtuni ber 55 prosent av kostnaðinum, og Sandavágs Komman hini 45 prosentini.

Í sáttmálanum stendur, at gjørt verður upp á hvørjum ári. Avtalan verður endurskoðað annaðhvørt ár, og um broytigar vera í býtislutfallinum, verður nýggj avtala gjørd tilsvarandi tí.

Um aðrar kommunur, sum ikki eru við í samstarvinum, ynskja at fáa næmingar í skúlan, verður tað avroknað eftir sama lutfallið, sum avtalað er millum tær báðar kommunurnar, sum nú hava gjørt samstarvsavtaluna.

Avtalan, sum nú er undirskrivað, er galdandi í tíggju ár. Um avtalan ikki er søgd upp innan 1. januar 2013, heldur hon fram og kann tá sigast upp við trý ára uppsagnarfreist.

Neyðug útbygging

Georg Hansen, formaður í Hallar- og skúlanevndini hjá Miðvágs og Sandavágs kommunum, sigur, at tey nú mugu fara at viðgera, hvussu verða skal við komandi skúlaútbygging, ella um byggjast skal nýtt.

Sum er ganga tey smæstu børnini í skúla í Sandavági. Men har er í løtuni bara pláss fyri einum flokki í Gamla Skúla. Fýra flokkar ganga í skúla í bygdarskúlanum í Miðvági, og flokkarnir frá sætta til tíggjunda ganga so á Giljanesi.

Georg Hansen heldur ikki, at hetta er ein haldbar loysn, tí tað fer við ov nógvari tíð, at lærarar skulu noyðast ferðast imillum.

Men enn er ikki gjørt av, hvussu hetta skal loysast, sigur Georg Hansen. Um byggjast skal nýtt í Sandavági, ella byggjast skal út í Miðvági. Ella at ein heilt nýggjur bygningur, sum hýsir øllum teimum yngru næmingunum, sum nú ganga í Miðvági og Sandavági, skal byggjast aftur at verandi skúla á Giljanesi. Hetta fer nevndin at viðgera í næstu framtíð, sigur nevndarformaðurin.

Eitt annað rættiliga átrokandi mál, sum nevndin noyðist at taka støðu til nakað skjótt, er takið á ítróttarhøllini á Giljanesi.

Tað hevur seinastu tíðina ikki verið í nóg góðum standi, og sum nevndarformaðurin sigur seg hava skilt, er tað avgerandi neyðugt at fáa tað skift nú. Tí tað klárar neyvan ein ringan vetur afturat, sigur hann.



*Rósa Samuelsen, borgarstjóri íSandavágs Kommunu, og Napolion Magnussen, borgarstjóri í Miðvágs Kommunu, skrivaðu fríggjadagin undir skúlaavtaluna*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Gulltíð í Sørvági

**Sørvágs Ítróttarfelag fylti 100 ár hósdagin, og leygarkvøldið varð skipað fyri stórum hátíðarhaldi í samband við dagin**

HÁTÍÐARHALD
*Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Sørvingar hátíðarhildu 100 ára stovningardagin hjá Sørvágs Ítróttarfelag við manér leygarkvøldið. Eini 400 folk vóru savnað til veitsluhald og dans. Stór myndafrásøgn frá tiltakinum kemur í komandi blað.

Fyri fullum útblástri hildu sørvingar burturi og heima saman við innbodnum gestum leygarkvøldið 100 ára føðingardagsveitslu fyri Sørvágs Ítróttarfelag.

Til borðhaldið, har eini 400 fólk luttóku, varð mangt tikið fram bæði til gamans og álvara.

Og so sera væl høvdu sørvingar »timað« gildið, nú teir júst hendan dagin høvdu spælt seinastu dystirnar í flogbóltskappingini hjá monnum, har meistaradeildarliðið hjá SÍ, sum fyrr í vár hevurvunnið steypakappingina, eisini hevur vunnið meitaraheitið. Flogbóltssambandið valdi sera passandi at handa teimum steyp og heiðursmerki á sjálvari jubileumsveitsluni.

Men eisini kvinnuunglarnir hjá SÍ eru meistarar í ár, og tað fekk onkran av røðarunum at halda, at Sørvágur nú gongur eini snnari gulltíð á møti.

Men tað helt ein av undirhaldarunum ikki vera heilt satt. Tí í Sørvági hevði verið gulltíð, líka síðan Elephant ølið varð forboðið.



*Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandi Føroya, handaði meistaradeildarliðnum hjá Sørvágs Ítróttarfelag heiðursmerki og steyp á 100 ára veitsluni leygarkvøldið*

*Mynd: Edvard Joensen*